## Alfred & co í serflokki

**Tinglimirnir úr Eysturoynni møta best upp í løgtinginum, meðan sandoyingar og suðuroyingar eru mest burturi**

UPPMØTING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Við Alfred Olsen sum flaggberara ganga tingmenninir í Eysturoynni undan í uppmøtingini í løgtinginum. Í miðal er hvørt umboð haðani burturi frá 1,1 løgtingsfundi.

Sosialurin førdi í gjár protokoll í løgtinginum fyri seinna hálvár í fjør, og uppgerðin, sum er grundað á gerðabókina hjá løgtinginum, vísir, at tað eru ymiskt, hvussu tingmenninir úr teimum ymsu valøkjunum skulka í miðal.

Tey sjey umboðini úr Eysturoynni førsømdu bara ein tingfund í miðal síðsta hálva ári.

Í hinum endanum eru sandoyingar og suðuroyingar.

Tað er viðbrekið at rokna miðaltal í teimum smáu valøkjunum, tí tey hava bara tvey umboð, men skal miðaltal roknast í Sandoynni, forsømdu tey bæði umboðini í miðal 6 fundir síðsta hálvár. Hjá suðuroyingum var miðaltalið 5,25 fundir.

Løgtingsfólkini í Vágum og Norðstreymoy kunnu koyra til høvuðstaðin, men forsøma tó meira enn eysturoyingar. Tingmenninir úr Vágum skulkaðu í miðal 4 fundir síðsta hálvár, og tey trý úr Norðstreymoy 3 fundir.

Í hølunum á eysturoyingum, sum hava staðfest sína skikkiligu støðu í løgtinginum, koma norðoyartingmenninir og tey úr høvuðsstaðnum.

Tað er merkisvert, at norðoyingar, sum bæði skulu sigla og koyra fyri at koma til arbeiðis, møta betur upp enn tingfólkini, sum búgva í høvuðsstaðnum.

### Miðaltøl

Miðaltalið fyri skulking í tinginum niðanfyri er roknað sum fráverudagar fyri hvørt løgtingsumboð. Fráveran er fyri seinna hálvár í 2004:

Sandoy: 6 fundir pr. tingfólk
Suðuroy: 5,25
Vágar: 4
Norðstreymoy: 3
Suðurstreymoy: 2,8
Norðoyggjar: 2,5
Eysturoy: 1,1

# Nú byrjar dysturin um starvslønirnar

**Mentanargrunnur Landsins vil nú hava umsóknir frá føroyingum, sum vilja gera mentanarligt arbeiði fyri almenna starvsløn. Tað er sera trupult at velja millum tær mongu umsóknirnar, sigur formaðurin fyri grunnin**

STARVSLØNIR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað er rættiligur gravgangur eftir at fáa starvsløn frá Mentanargrunni Landsins, og nú byrjar kapprenningin um pengarnar aftur.

Á hvørjum ári letur grunnurin starvslønir til føroyingar, sum gera mentanarlig arbeiði av ymsum slagi, og nú nærkast freistin fyri at lata umsóknir til hendan stuðul.

– Vanliga er áhugin fyri hesum starvslønum sera stórur, og bara ein partur av teimum, sum søkja, kunnu fáa starvløn. Tað er vanligt, at tað koma yvir 100 umsóknir, og bara einar 15 ella 20 fáa starvsløn, sigur Rói Patursson, sum er formaður fyri Mentanargrunn Landsins.



*– Nevndin fyri Mentanargrunnin skal taka støðu til, hvørjar av teimum mongu umsóknunum skulu fáa pengar, og tað royna vit at gera so gott sum vit kunnu út frá krøvunum í lógunum, men tað er sera trupult, sigur Rói Patursson, formaður í Mentanargrunni Landsins*

### Trupult at velja

Í lýsingum í bløðunum nú um dagarnar boðar Mentanargrunnurin frá, at í seinasta lagi 11. februar skal grunnurin hava fingið umsóknirnar frá fólki, sum vilja sleppa upp í part.

– Nevndin fyri grunnin skal taka støðu til, hvørjar av teimum mongu umsóknunum skulu fáa pengar, og tað royna vit at gera so gott sum vit kunnu út frá krøvunum í lógunum, men tað er sera trupult, sigur Rói Patursson.

Tað koma nógvar góðar og fjølbroyttar umsóknir, og tí er tað ein næstan vónleys uppgáva hjá nevndini at taka dagar, hvat hevur betur uppiborið almennan stuðul enn annað.

– Játtanin hjá okkum í ár er 300.000 krónur minni enn undanfarin ár, og tí verður eisini minni at lata til starvslønir hesaferð.

Mentanargrunnur Landsins kann lata upp í helvtina av sínari játtan til starvslønir, og seinni árini hevur grunnurin havt tann politikk, at so nógv sum gjørligt skal latast sum starvsløn.

### Upp í trý ár

Endamálið við starvslønunum er stuðla arbeiði, sum verður gjørt fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísund og annað – og tað er hjá bæði leikum og lærdum, sum tikið verður til.

Mentanargrunnurin letur eina starvsløn, sum er galdandi fyri trý ár, og síðani styttri starvslønir, sum kunnu verða alt frá einum mánaði til eitt ár. Vanliga verða nógvar av teimum minni starvslønunum lætnar hvørt ár.

Lønin til tey, sum fáa starvsløn, svarar til eina læraraløn í fólkaskúlanum á fyrsta stigi. Tað vil siga, at fólk fáa 21.335,70 krónur um mánaðin fyri at arbeiða við mentanarligum tilfari ella líknandi.

# Neyðug nýtsla skapar framgongd

**– Raksturin hjá Klaksvíkar kommunu er nógv øktur síðstu árini, men afturfyri fáa borgararnir nógvar nýggjar ella bøttar tænastur á ymsum økjum, sigur borgarstjórin í Klaksvík**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Tað er ikki av ongum, at útreiðslurnar hjá Klaksvíkar kommunu eru nógv vaksnar síðstu fýra árini.

Tað er boðskapurin hjá borgarstjóranum, Steinbjørn O. Jacobsen, sum í eini grein í Norðlýsinum fríggjadagin greiðir frá, hvat tær øktu rakstrarútreiðslurnar eru brúktar til.

Varaborgarstjórin Jákup Mikkelsen hevur sagt, at útreiðslurnar hjá Klaksvík-



*– Fólk hava fingið og fáa framvegis nakrar nýggjar ella bøttar tænastur fyri øktu útreiðslur hjá kommununi, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, um stóra vøksturin í rakstrinum seinnu árini*

ar kommunu mugu tálmast, annars verður endin galin, og hann hevur víst á, at rakstrarútreiðslurnar vuksu úr 43 milliónum og upp í slakar 74 milliónir eftir fýra árum.

– Økti raksturin hevur sína greiðu orsøk, sigur Steinbjørn Jacobsen í sínum innleggi til kjakið.

### Fólk fáa nakað fyri pengarnar

Borgarstjórin í Klaksvík vísir á nøkur øki, har undanfarni meirilutin setti sær nøkur mál og gjøgnumførdi tey.

– Tað sigur seg sjálvt, at tað kostar at geva borgarunum nakrar nýggjar tænastur, og so vaksa upphæddirnar á útreiðslusíðuni hjá kommununi. Men latið okkum í hesum sambandi ikki gloyma, at fólk hava fingið og framvegis fáa nakrar nýggjar ella bøttar tænastur fyri hesar øktu útreiðslur, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.

Borgarstjórin nevnir útbyggingar í barnaansingini, vatnveitingini, renovatión, , skúlunum og annað, sum rakstrarpengar eru brúktir til seinastu fýra árini. Næstan helmingurin av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum eru til barnaansingina í kommununi, sum hevur verið raðfest høgt, og sum eisini nýggi meirilutin vil hava ovarliga á sínum lista.

– Sjálvandi skal eg ikki avvísa, at kommunan kann spara í rakstrinum, men eg vil samstundis peika á, at hetta í flestu førum vil merkja eina lækking í tænastustøðinum, og viðgerðin av slíkum sparingum eigur so undir ongum umstøðum at byrja í fjølmiðlunum, sigur Steinbjørn O. Jacobsen og sipar helst til nýggja varaborgarstjóran hjá sær, sum hevur tosað um at tálma raksturin.